# Fólkavognurin - bilurin til vanliga fólkið

**VW Type 1, Boblan, bleiv ein av heimsins mest seldu bilum. Grundarsteinurin til Fólkavognsverksmiðjuna varð lagdur 26. mai 1938. Men framleiðslan byrjaði ikki fyrr enn eftir seinna heimsbardaga**



*Fyrsta Fólkavognsboblan í Føroyum. Bilurin bleiv seldur til Hjalmar Jacobsen, elverkstjóra norðuri á Strond í Klaksvík. Hetta var 17. juli 1953. Á myndini, ið er tikin í 1954, síggjast døtur hansara, Ingun Joensen og Elin Súsanna Jacobsen*

*Myndaeigari: Randi Jacobsen*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Hugskotið um Fólkavognin kom fyrstu ferð fram í 1920, tá ein greivi legði eitt uppskot fram fyri Ferdinand Porsche um ein bil til leikmannin, ið ikki hevði so nógvar pengar at ráa yvir. Í 1931 kom Porsche við eini ætlan, ið nevndist »projekt 12« ið má metast sum tann fyrsta ætlanin, ið skuldi føra til VW Type 1. Fíggjarorkan í bilídnaðinum var so vánalig, at ongin hevði orku til at menna eitt nýtt bilmodell og at gera tey neyðugu framleiðslutólini.

## Ferdinand Porsche og Adolf Hitler

Á bilaframsýningini í Berlin var vanligt at ríkisovastin helt røðu. Fyrsta almenna røðan hjá Adolf Hitler sum ríkiskanslari var við hesa bilaframsýning í 1933, har hann lovaði, at nýggir motorvegir skuldu gera eitt net um alt Týskland, og hvør týsk familja skuldi hava ráð til egnan bil. Ferdinand Porsche sendi eina frágreiðing um Fólkavognin til Hitler, og avtalaðu teir at møtast í Berlin. Sum vanligt legði Hitler alt fram, sum um tað var hansara hugskot. Porsche hevði roknað út, at ein Fólkavognur kom at kosta 1.550 Markar. Til tað svaraði Hitler at alt undir 1.000 Markar var í ordan. Hann segði eisini at um bilídnaðurin ikki megnaði at gera ein Fólkavogn til rætta prísin, so skuldi staturin nokk klára uppgávuna. Hetta førdi við sær at Porsche bleiv sendur eina námsferð til USA. Heim afturkomin varð hann sannførdur um, at Fólkavognurin kundi framleiðast til tann ásetta kostnaðin, um hann fekk somu framleiðslutólini, sum amerikanarnir høvdu.

## Grundarsteinurin lagdur í 1938

Grundarsteinurin til Fólkavognsverksmiðjuna varð lagdur tann 26. mai 1938 við gamla Wolfsburg slottið nærhendis lítla býnum Fallersleben í Týsklandi. Tá heimsbardagin brast á, var verksmiðjan ikki liðug. Tá so framleiðslan kom í gongd, vóru tað hernaðarbilarnir VW Kübelwagen, ið vóru framleiddir har. Tá kríggið var av, vóru 60 prosent av verksmiðjuni í sori eftir øll loftálopini. Endurreisingin var sera stríggin, men teir komu so líðandi í gongd aftur. Í 1945 vóru framleiddir 1785 bilar, í 1948 høvdu teir framleitt 19244 bilar og tíggju ár seinni, í 1958, vórðu framleiddir yvir hálv millión VW boblur, umframt bussar og vørubilar. VW kláraði at sláa sítt egna met tá VW Golf nummar 21.517.415, tann 25 juni í 2002 fór av samlibandinum í Wolfsburg. Harvið fór Golfurin fram um bobluna og er sostatt tann VW bilur, ið er framleiddur í størst nøgdum nakrantíð.

**Fólkavognurin hjá Katrin Joensen á Argjum. Bilurin er ein Volkswagen 1200 »Jeans« jubileumsmodell frá 1973. Á Jeans útgávuni eru setrini betrekt við cowboystoffi. Motorurin er ein 4 syl. 1,2 litur boxermotorur við 34 DIN hk. Bilurin er heilt originalur og sær út sum nýggjur. Bilurin bleiv keyptur frá Føroya Motor Co., ið tá hildu til í Hornabø. Hann bleiv settur í stand um heystið í 1994. Her er ættartalvan hjá bilinum:**



*Katrin Joensen á Argjum við sínum sera væl hildna Volkswagen 1200 »Jeans«, Fø 54.025, frá 1973*

| | |
|---|---|
| 1973-78 | Jonhard Egholm, Streymes |
| 1978-79 | Wenzel Petersen, Tórshavn |
| 1979 | Eiler Poulsen, Hoyvík |
| 1979-94 | Poula Klein, Vestmanna |
| 1994- | Katrin Joensen, Argir |



*Hans Johannes Clementsen og Beinar Vestergaard. Bilasølan Norrøna v/ Beinar Vestergaard seldi Fólkavognar frá 1975 til 1985. Hans Johannes var ímyndin av Fólkavognunum í Føroyum. Hann arbeiddi í meira enn 30 ár við Fólkavognum*

*Myndaeigari: Beinar Vestergaard*




*Lýsing hjá Hans Johs. Clementsen frá 1958*

## Cadillac 100 ár



Tann 22. august vóru liðin 100 ár síðan fyrsti Cadillac bilurin koyrdi út av bilverksmiðjuni í Detroit. Navnið Cadillac stavar frá franska heryvirmanninum, Antoine de la Mothe Cadillac, sum í 1701 grundaði býin Ville d'Etroit. Býurin broytir seinni navn til Detroit

*Kelda: Motor Magasinet*

## Mini politibilar



BMW Mini Cooper koyra sum politibilar í München. Bilarnir eru sergjørdir við styrktum undirvogni, upphangi, fjaðrum og bremsum

*Kelda: Motor Magasinet*

## Nýggjur Rover motorur



Rover koma nú við einum nýggjum motori til 75-seriuna. Talan er um 1.8T motorin við 150 hk. Motorurin vigar einans 100 kg, koyrir frá 0-100 km/t uppá 9,5 sek. og toppferðin er 210 km/t

*Kelda: Motor Magasinet*




# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**

Fyrivarni verður tikið fyri villum



**CITROEN SAXO 1.5D 3H**
Árg Jan´01, Km 35.000 .
Kr. 116.000.



**CITROEN XANTIA 1.9TD 5H**
Árg Aug´97, Km 120.000 .
Kr. 121.000.



**MITSUBISHI CARISMA 1.6GL 5H**
Árg Okt´96, Km 81.000 .
Kr. 85.000.



**FORD SIERRA 2.0I CLX 4H**
Árg nov´91, Km 112.000 .
Kr. 45.000.



**JEEP CHEROKEE 2.5TD 5H**
Árg Juli´97, Km 80.000 .
Kr. 135.000.



**SEAT CORDOBA 1.9SDI STC**
Árg Aug´99, Km 36.000 .
Kr. 105.000.



**CITROEN XSARA 1.9HDI 5H**
Árg Juni´99, Km 117.000 .
Kr. 137.000.



**CITROEN XANTIA 1.9TD STC**
Árg Mars´99, Km 45.000 .
Kr. 160.000.



**MITSUBISHI LANCER 1.3I 4H**
Árg Aug´98, Km 28.000 .
Kr. 112.000.



**MAZDA DEMIO 1.3 5H**
Árg Feb´99, Km 50.000 .
Kr. 87.000.



**PEUGEOT 306 1.9D 4H**
Árg Mei´95, Km 163.000 .
Kr. 79.000.



**CITROEN XSARA 1.6I STC**
Árg Sept´00, Km 18.000 .
Kr. 135.000.



**MITSUBISHI GALANT 1.8GLSI SPORT**
Árg Juni´92, Km 150.000 .
Kr. 37.000.



**MITSUBISHI LANCER 1.5GLXI**
Árg Mei´92, Km 145.000 .
Kr. 48.000.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo



**FORD ESCORT STV. 1,6 110 HK**
Árg des.95, Km 111.000.
sleipikrók, eyka felgur.
Kr. 55.000.
319626






**FORD ESCORT HATCHBACK DIESEL**
Árg des.96, Km 105.000. Nýliga sýnaður. Í góðum standi.
Kr. 80.000.



**DAIHATSU SIRION 5/HURÐAR**
Árg apr. 2000, Km 51.000.
Kr. 80.000.



**CITROEN 1.6 GTI HATCHBACK**
Árg Jan. 92, Km 64.900. Sera vælhildin,1.eigari, bert koyrt 64.900 km eyka hjólsett fylgir við..
Kr. 48.000.



**FORD FOCUS CHIA**
Árg mar.99, Km 51.800. Sera væl hildin, sentrallás, CD anlegg, hita í setrunum, el-síðuspegl v.m..
Kr. 135.000.



**ROVER 75 2.0 V6 CLUB**
Árg jun. 2000, Km 36.000. Klimaanlegg, el- rútar, el-síðuspegl, CD anlegg+nógv eykaútstýr. Kr. 248.000.



**ROVER 620 TI 200 HK**
Árg Juli.99, Km 72.000. Sera vælhildin Leður inntrekk Aircon.C.D.Anlegg fjarðstýrt centrallás El.rútar El.spegl Anti spin v.m.. Kr. 220.000.



**KIA SEPHIA 1.5 GTX**
Árg aug.99, Km 26.700. Sera væl hildin, sleipikrók. Fyrr kr.108.000. Tilboð nú, uttan bil í býti kr.90.000.



**DAIHATSU COURE 1. DELUXE**
Árg sep.2000, Km 8.700. Sera væl hildin. Til sølu vegna útbúgving uttanlanda. Sentrallás el- rútar, el-síðuspegl, servostýring v.m..
Kr. 88.000.



**NISSAN SUNNY COUPE**
Árg Nov.88, Tilboð.
Kr. 6.000

**FORD ESCORT STATIONCAR DIESEL**
Árg okt.95, Km 104.500.
Kr. 95.000.



**HYUNDAI ATOS**
Árg jun.99, Km 39.000. Vælhildin.
Kr. 68.000.

P/f. D. B. Bilar
nas Bron ksg ta
l Fa

UNITED seafood

**Starvsfólk**

Føroya Fiskavirking Vestmanna søkir eftir røskum fólkum til alt vanligt flakaarbeiði so sum:

- landing
- maskinskering
- reinskering
- trukkoyring, o.s.fr.

Tey, ið sett verða, kunnu byrja beinanvegin.

Arbeitt verður í vaktum.

Áhugaði kunna ringja til virkið tel 424655 og tel 214655.

Løn sbrt. sáttmála.




Føroya Fiskavirking
Vestara Bryggja
P.O. Box 3183
110 Tórshavn
Tel: 35 55 55
Tel: 35 55 50
www.united.fo

FØROYA FISKAVIRKING